# Oddur søkti Víking

**VODAFONEDEILDIN Oddur Højgaard gjørdist stóra hetjan hjá toftamonnum, tá hann við trimum málum seint í dystinum, legði lunnar undir einum 5-3 sigri til B68, eftir at Víkingur hevði verið á odda 2-3 í hálvleikinum**



Ólavur Øre Hansen

**B68** 5
**Víkingur** 3

Hóast hann hevur verið brúktur í miðverjuni hjá B68 higartil, so vísti Oddur Højgaard at máltevinum bilar einki, tá hann var skiftur inn í álopið hjá toftamonnum seint í dystinum. Ungi toftamaðurin var høvuðsorsøkin til at toftamenn fingu drigið sigurin í land, í einum spennandi og intensum dyst, sum tó var merktur av óvanliga nógvum persónligum mistøkum.

Nógvu persónligu mistøkini myndaðu dystin, og gjørdu sítt til at talan varð um eina málríka Eysturoyar-uppgerð. Tó at bæði liðini gjørdu nógv mistøk, so hevði Víkingur munin, og tí taptu teir dystin.

### Málverjar í gávuhýri

Toftamenn fingu ein flúgvandi byrjan uppá dystin, og tá eitt korter var farið av dystinum vóru teir á odda 2-0. Serliga málið til 1-0 var klossut av málverjanum hjá Víkingi, tá hann boksaði bóltin í nakkan á einum viðleikara og í málið.

Hóast vertirnir byrjaðu betur, so vístu Víkingar góðan stríðsvilja, og so hvørt sum minuttirnir gingu, tóku gestirnir stýringina av dystinum.

Tað gekk ikki long tíð, áðrenn leikliga yvirvágin hjá gestunum gav úrslit. Fyrst minkaði Súni Olsen um munin, áðrenn Vlada í B68 málinum, gjørdi starvsfelaginum í hinum endanum kynstrið eftir, og misti bóltin til ein púra fríðan Sølva Vatnhamar, sum takkaði fyri tilboðið og setti bóltin í tóma B68 málið.

Sjálvt um Víkingur vóru komnir uppá javnt, so vildu teir meira, og stutt undan hálvleiksteðginum gav trýstið úrslit, tá Sverri Jacobsen stútaði bóltin í netið eftir eitt gott fríspark frá Súna Olsen.

### Oddur vendi dystinum

Eftir steðgin royndi B68 at trýsta fyri at fáa útjavnandi málið. Hóast toftamenn komu til nakrar hálvvandamiklar málroyndir, so bleiv tað bara til líka við og næstan.

Heldur vóru tað gestirnir úr Víkingi, sum høvdu ein gyltan møguleika at økja um leiðsluna, tá tað restaðu 15 minuttir av dystinum. Besti leikarin hjá Víkingi mánakvøldið, Súni Olsen, kom einsamallur móti málverjanum hjá B68, sum tó fekk rættað uppá droppið í fyrra hálvleiki við at bjarga skotroyndini hjá gøtumanninum.

Eitt korter fyri dystarlok varð Oddur Højgaard sendur skiftur inn í álopið hjá B68, og gav hann toftamonnum fleiri møguleikar í álopsspælinum. Oddur er sterkur í luftspælinum, og tað prógvaði hann 10 minuttir áðrenn dystarlok, tá hann var hægstur og stútaði bóltin hegnisliga í kassan eftir innlegg frá Kristian Anton Andreasen.

Útjavnandi málið gav B68 nýggja orku, meðan Víkingur fall í fátt, og so gjørdi tað ikki støðuna hjá gestunum betur tá Geza Turi enn einaferð søplaði bóltin burtur eftir eitt hornaspark, og so var lagamanni hjá Odduri at leggja B68 á odda, áðrenn hann staðfesti sigurin við triðja málinum í síðsta minutti av dystinum.

Við sigrinum fór B68 fram um Víking á stigatalvuni, og liggja nú á triðja plássi.

*post@sosialurin.fo*



## Oddur Højgaard:

# Eg hevði nakað at prógva

*Segði ein fegin trýmálskjútti eftir dystin.*
*– Eg byrjaði á bonkinum, og vildi vísa at tað var eitt mistak, tá eg kom inn, sigur Oddur Højgaard.*
*Spurdur um hvussu tað var at gerast tann heilt stóra hetjan hjá toftamonnum, segði Oddur Højgaard, at tað er altíð stuttligt at skora, men tað hevur meira at týða at vit vinna dystin.*
*– Vit byrjaðu væl uppá dystin, men sovnaðu, og lovaðu teimum inn afur í dystin, men í seinra hálvleiki vóru vit væl betri enn Víkingur, og tí er tað uppiborið at vit vunnu dystin, sigur Oddur Højgaard at enda.*

### B68 - Víkingur 5-3 (2-3)

**1-0: Sjálvmál, 3.**
**2-0: Pól Jóhannus Justinussen, 15.**
**2-1: Súni Olsen, 19.**
**2-2: Sølvi Vatnhamar, 35.**
**2-3: Sverri Jacobsen, 41.**
**3-3: Oddur Højgaard, 80.**
**4-3: Oddur Højgaard, 85.**
**5-3: Oddur Højgaard, 90.**
Dómari: Lars Muller

**B68:** Vlada Filipovic – Poul N. Poulsen, Øssur Hansen, Johan Dávur Højgaard, Niklas Joensen (84. min: Óli Olsen) – Jóhan Petur Poulsen (74. min: Oddur Højgaard), André Olsen, Ndende Adama Gueye, Pól Jóhannus Justinussen (71. min: Eli Simonsen) – Dánjal Pauli Højgaard, Kristian Anton Andreassen.
**Víkingur:** Geza Turi – Sverri Jacobsen, Atli Gregersen, Niclas Niclasen, Hanus Jacobsen (89. min: Martin Olsen) – Súni Olsen, Nenad Stankovic(89. min: Ingi Sørensen), Sam Jacobsen, Sølvi Vatnhamar, Bárður Hansen (73. min: Kaj Leo í Bartalstovu) – Finnur Justinussen.

